## Hans Jørgen mátti seymast

Víkingurin Hans Jørgen Djurhuus sá út sum ein veruligur víkingur, tá dysturin móti NSÍ var av fríggjakvøldið. Í samanstoyti við Øssur Dalbú var hann so óheppin, at fáa hol á høvdið, soleiðis at hann mátti seymast við trimum stingum.



## Crouch á veg til Portsmouth

Stóri maðurin í Liverpool, Peter Crouch, er eftir øllum at døma á veg til Portsmouth. Har kemur hann aftur at arbeiða saman við Harry Redknapp, ið var venjari hjá honum í Southampton og Portsmouth. Søluvirðið er umleið 110 mió.. Hetta skrivar BBC Sport í dag. Tann 2,01m langi Crouch hevur verið í Liverpool síðan juli 2005, og hevur hann skorað 40 mál í 135 dystum. Síðsta kappingarár kom hann oftast á vøllin sum innskiftari, og tá hann bert hevur eitt ár eftir av sáttmálanum, hevur Liverpool gjørt av at selja. Hann skal nú gjøgnum heilsukanningar, og væntandi verður sáttmálin undirskrivaður í hesi vikuni.




*Tveir FM-róðrar eru eftir, og hjá gentumanningunum er alt enn púrasta opið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Drekastevnið fremst allan teinin

**Hóast tær á Hvassa royndu fleiri ferðir, so megnaðu genturnar í Sunda Róðrarfelag ongantíð at vinna tað aftur, sum Drekin vann longu í startspurtinum**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í dýrdarlíkindunum á fjarðastevnu í Vestmanna gekk fyrsta startskotið av, tá ið klokkan var neyvt og akkurát trý.

Fyrsti róðurin var millum 5-mannafør við gentur. Sigursharrarnir - ella genturnar – higartil, Drekin og Hvassi, togaðust um sigurin. Drekin stakk beinanvegin drekastevnið framum Hvassa, og hóast genturnar á Hvassa gjørdu fleiri royndir, so eydnaðist teimum ongantíð at taka munin innaftur.

Hvassi fór fyrst undir endaspurtin, og eina lítla løtu tóktist tað sum um, at Hvassi skuldi taka Drekan. Munurin minkaði til hálvan skut ella so, men so svaraðu tær á Drekanum aftur, og tá ið bátarnir fóru um málið, var tað eingin ivi um, at Drekin hevði vunnið.

Junkarin, Firvaldur og Jallurin vístu eisini góðan róður. Leingi vóru hesir bátarnir við í kappingini um næstfremsta plássið, men í endaspurtinum dragnaðu hesir bátarnir eitt lítið vet.

FM kappingin millum Drekan og Hvassa er hørð undan teimum báðum síðstu róðrunum. Drekin er eitt stig frammanfyri Hvassa!

# Fleiri fleirfaldir málskjúttar

**Meðan kortveitsla varð hildin í Leirvík, skutu tríggir spælarar hattrick aðra satðni kring landið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nú tað bara restar eitt umfar undan stutta summarsteðginum eru tað VB/Sumba og 07 Vestur, sum eru á uppflytingar plássunum. AB hongur væl í, eftir at argjamenn vunnu í Leirvík, meðan TB misti rættuliga nógv við tapinum í Sørvági.

Stóri málskjúttin hjá 07 Vestur var hesa ferð Jens Erik Rasmussen, sum 2. juni fylti 40 ár. Jens Erik skoraði øll trý málini hjá heimaliðnum, og ein annar veteranur, Óli Johannesen, minkaði eftir frísparksinnlegg um munin fyri TB.

Í Vági skoraði Dan Djurhuus tríggjar ferðir fyri VB/Sumba, sum hevði vitjan av B68. B68 veteranurin Súni Fríði Barbá minkaði um munin til 3-1 tíðliga í 2. hálvleiki, og tað gjørdist rættuliga spennandi eina lítla løtu, tá ið unglingaspælarin Remi Langgaard minkaði um munin at vera eitt mál. Men talan var bara um spenning í eina lítla løtu, tí VB/Sumba svaraði beinanvegin aftur.

Í Leirvík tryggjaði AB sær týdningarmiklan og trivaligan 5-1 sigur. Talan var um rættuliga friðarliga uppgerð, men í góðveðrinum vóru kortini ofta á lofti. Dómarin vísti fjúrtan ferðir ostaflísina – ofta segði hann tað vera fyri munnhøggarí – og tríggjar ferðir varð flísin konverterað til ostaskorpuna.

Hetta bar við sær, at Víkingur eina løtu í 2. hálvleiki spældi við níggju ímóti ellivu.

Í Runavík lyfti heimaliðið sær eitt sindur longri burtur frá botninum, meðan vánaliga gongdin hjá KÍ, og harvið kósin ímóti botnplássi, helt fram.

Stóri málskjúttin hjá NSÍ var unglingaspælarin Klæmint Andrasson Olsen, sum skoraði tríggjar ferðir.

Í síðsta umfarinum undan summarsteðginum verða bara tríggir dystir á skránni. TB hevur longu vunnið 6-0 á NSÍ, og Víkingur hevur vunnið 2-0 á útivølli ímóti EB/Streymi. Toppuppgerðin verður í Sørvági, har VB/Sumba fer at vitja leygardagin, og tá spæla eisini AB-HB og B68-KÍ.

## Spennani eina løtu

**Kvinnurnar á Sílinum vóru á málinum eina bátslongd frammanfyri Frúnna, sum saman við tveimum øðrum royndu at geva HR kvinnunum kapping**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er eingin ivi. Kvinnurnar í Havnar Róðrarfelag, sum sita umborð á Sílinum, eru tær bestu í teirra kapping. Tað hava tær víst á fýra teimum undanfarnu stevnunum, og tað slerdu tað so rimmar fast í endaspurtinum í dag.

Í fínu líkindunum var tað hugaligt hjá áskoðarunum at síggja vakra róðurin og fína endaspurtin hjá Sílinum, sum sannførandi svam frá hinum bátunum.

Leingi var ógvuliga javnt. Báran, Katla og Frúgvin bjóðaðu av, og eina løtu var púra javnt ímillum hesar tríggjar bátarnar og Sílið.

So mistu Báran og Katla, meðan Frúgvin úr Miðvági eina løtu royndi at halda tørn. Tað megnaðu tær í eina løtu, men so stakk Síllið seg framum, og í endaspurtinum longdist munurin støðugt.